# Føroyska lyndið vann á føroyska veðrinum

**Annað árið á rað var Summarfestivalurin raktur av vátum og keðiligum veðrið, men lagið var gott á fólki. Tað tykist sum um, vit eru so von við mjørka og regn, at vit bara góðtaka støðuna.**

SUMMAR FESTIVALUR

Niels Uni Dam,
Dagfinn Olsen og
Heini S. Kristiansen

Tað skuldi henda onkuntíð! Hesi orðini eigur ein ungur maður, ið vit hittu á festivaløkinum í Klaksvík leygarkvøldið. Hetta var, áðrenn tað gjørdist greitt, at flogførini við Johnny Deluxe, Dave Phelps og Roger Hodgson vóru lend.

Vit mugu geva honum rætt, føroyska summarveðrið og tey svikaligu líkindini at lenda í Vágum, argaðu Outlandish og G!Festivalin og nú misti Summarfestivalurin tað stóra høvuðsnavnið og trekkplástrið, tí ikki var lendandi í Vágum. Harafturat sótu fleiri bólkar á flogvøllinum forðaðir í at sleppa víðari á konsertferðum sínum. Viðurskiftini at hava tílík tiltøk í Føroyum eru trupul, og hevði tað ikki verið fyri tí sera stóru vælvild, ið Atlantic Airways sýndi, hevði ársins Summarfestivalur veruliga verið løtan, tá veðrið knúlvaði einum festivali. Hetta eru við urskiftini, ið fyrireikararnir av tiltøkum í Føroyum virka undir og, ja, hetta skuldi henda onkuntíð.

Summarfestivalurin var ein vát uppliving. Tað var ikki fyrr enn sunnudagin, at sólin endiliga slapp gjøgnum skýggini. Hetta taldi sera nógv niður fyri heildarupplivingina. T.d. gjørdi regnið leygardagin, at stóra Silvalandið, ið man vera Føroya størsta spælipláss, bert var í eini skerdari útgávu.

Men tað var merkisvert at síggja, hvussu væl áskoðararnir tóku bæði veður og avlýsingar. Tað tykist, sum um fólk bara góðtóku støðuna. Ein kensla av - um Shu-Bi-Dua ikki tímir at koma til okkara, so tíma vit heldur ikki at hava Shu-Bi-Dua, tykist at valda. Vit eru stutt sagt vorðin so von við føroyska veðrið, at vit góðtaka bara at fáa karm, tá vit fara á konsert.

Tað var eisini merkisvert at síggja, hvussu teir føroysku bólkarnir, ið vóru fluttir av lítla pallinum upp á høvuðspallin, megnaðu at lyfta uppgávuna: Eyðun og Terji, Anfinn og Co. og Hanus gjørdust millum bestu festivalupplivingingar. Hetta vísir, at føroysku bólkarnir megna tílíkar uppgávur. Tað var tó heldur ørkymlandi við øllum broytingunum í skránni. T.d. vóru konsertirnar við Hanusi, Anfinn og Co og Eyðun og Terja framskundaðar, meðan konsertin hjá Kim Hansen var flutt aftur. Hetta er óheppið og summi fólk sluppu ikki á konsertir, ið tey ætlaðu sær á. Her hevði kanska verið betur, um aðrir bólkar vóru tiknir inn, soleiðis at restin av skránni bleiv hildin. Tað er sjálvandi keðiligt hjá teimum, sum ætlaðu sær at síggja t.d. Eyðun og Terja kl. 2 um náttina, at bólkurin var liðugur at spæla beint eftir miðnátt. Men hetta eru truplar umstøður hjá fyriskiparunum.

Tað vóru tó fleiri trupulleikar við fyriskipanini, ið fyrireikararnir mugu taka á sín kappa. Tað gekk t.d. alt ov spakuligt at fáa fólkið inn á økið fríggjakvøldið. Manningin í básunum var alt ov lítil, og at hava bert eina maskinu at klípa armbondini á við er burturvið. Fólk, ið longu hevði keypt atgongumerki, stóðu í bíðirøð úti við ein tíma. Hetta skal kunna gerast betur.

Vaktarfólkið á festivalinum var eisini av sera ymiskari góðsku. Meðan summi gjørdu eitt gott arbeiði vóru onnur út av lagi vánalig. T.d. bar ofta til at sleppa inn við taskum fullum av øli, uttan atgongumerki og alvápnaður, um tú hevði hug til tað. Summir av vaktunum tóktust meira upptiknir av at práta við vinfólk enn av arbeiðinum.

Nógv hevur verið tosað um ljóðið á Summarfestivalinum. Størsta ljóðanleggið í føroyskari tónleikasøgu varð sett upp til endamálið. Men tó var bert hendingaferð, at talan var um veruliga gott ljóð. Hetta økið er so risa stórt, at anleggið skal vera uppaftur størri. Tað var tíanverri ikki bert anleggið, ið bilaði. Á fleiri konsertum, serliga fríggjakvøldið, var handverkið hjá ljóðmanninum als ikki nóg gott.

Samanumtikið var festivalupplivingin merkt av veðrinum, og hóast lagið á fólki var rættiliga gott, so bíleggja vit sól og summar til næsta Summarfestival.

# Magni bjargaði Summarfestivalinum




***Áskoðararnir á Summarfestivalinum mundu mist fleiri av stóru upplivingunum. Mynd: Álvur Haraldsen***

**Fyri at útlendsku nøvnini skuldu sleppa á pall á Vágsbøi í sunnunáttina, sendi Atlantic Airways flogfar til Kastrup eftir teimum.**

SUMMAR FESTIVALUR

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Klokkan var farin av tvey sunnunáttina, tá Johnny Deluxe endiliga fór á pallin á Summarfestivalinum. Men enn var stúgvandi fult av fólki á Vágsbøi. Men tað var bert við stórari vælvild frá Atlantic Airways, at gestirnir á Summarfestivalinum upplivdu hetta hæddarpunktið á festivalinum.

Vitandi um, at Shu-Bi-Dua, Johnny Deluxe og David Phelps sótu á flogvøllinum í Kastrup, meðan útvið 10.000 fólk bíðaðu eftir teimum í Klaksvík, tók Atlantic Airways eini óvanlig stig.

Eitt av flogførum felagsins stóð í Basel, har tað júst hevði fingið nýggjan motor. Ætlanin var, at flogfarið skuldi flúgva til beint Føroyar, tá líkindi vóru. Men ístaðin varð flogfarið sent til Danmarkar, eftir tónleikarunum, og øðrum viðskiftafólki. Magni Arge stjóri greiður frá:

- Vit gjørdu okkara besta! Við at taka hetta flogfarið inn, kundu vit spara 2 tímar. So vit sendu tað til Danmarkar eftir bólkunum og fyltu tað so upp við ferðafólki. So vónaðu vit, at tað fór at sleppa at seta seg í Vágum, og tað eydnaðist. Eg haldi bara, at tað er harmiligt, at Shu-Bi-Dua ikki kom við.

Shu-Bi-Dua valdi ikki at koma við flogfarinum, tí at sangarin sambært bólkinum var vorðin sjúkur, beint áðrenn farast skuldi umborð.

- Tá flogfarið kom í Vágarnar vóru ikki líkindi at lenda. Hesa løtuna flugu trý flogfør uppi yvir, og hóast tað var vorðið klárt á Sørvágsfirði, lá ein hattur av mjørka yvir flogvøllinum, og líkindi vóru tí ikki at lenda. Flogførini vóru øll trý um at røkka markið við brennievni, soleiðis at tey máttu fara avstað aftur -Men so klárnaði tað knappiliga í. Løtu seinni stóðu øll trý flogfør á vøllinum, sigur Magni Arge.

Hann gleðist um, at tey kundu hjálpa Summarfestivalinum og hinum sum komu við hendan túrin. Hann vísir á, at hetta eydnaðist orsaka av stórari vælvild frá starvsfólkinum hjá Atlantic Airways, og hann sigur, at hann kendi veruliga á starvsfólkinum, at tey vildu hjálpa, so at hetta skuldi eydnast.

- Roger Hodgson hevði flogið 36 tímar, áðrenn hann lendi í Vágum, og tá vóru bert fáir tímar til, hann skuldi avstað aftur, og tí varð tyrlumanningin kallað til arbeiðis, og Hodgson varð flogin úr Vágum til Klaksvíkar.

Magni Arge sigur, at hann er glaður um, at hetta eydnaðist, men sigur seg tó vera harman um, at hann sjálvur ikki fekk verið á festivalinum, men mátti vera á flogvøllinum allan dagin.